# Vit kunnu ikki brúka eina heila milliard til onga nyttu




**– Tað er ongin fornuft í tosinum um at gera ein alternativan flogvøll í Føroyum og eg ivist ikki í, at vit eisini um 10 ár hava ábyrgdarfullar politikarar, sum ikki vilja blaka eina milliard í ein flogvøll, sum vit onki fáa burturúr, sigur Jørgen Niclasen**

FLOGVØLLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

At byggja ein flogvøll afturat í Føroyum, er tað sama sum at blaka eina heila milliard burtur til onga nyttu.

Tað heldur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin í Vágoy.

Hóast landsstýrið hevur samtykt at leinjha flogvøllin í Vágum, verður framvegis tosað um, at tað er neyðugt at hava eina alternativan flogvøll.

Men fólkafloksmaðurin úr Vágum sigur, at hann enn hevur ikki enn hoyrt eina einastu skila góða orsøk fyri at byggja ein flogvøll afturat.

– Skal eg hugsa lokalpolitiskt, hevur vøllurin í Vágum sera stóran týdning fyri búskapin í økinum, tí har eru so nógv arbeiðspláss. Hann er ein so týðandi partur av lívsgrundarlagnum, at verður hann fluttur, hevði tað verið ein búskaparligur sorgarleikur fyri Vágar.

– Men skal eg sleppa lokalpolitikkinum, dugi eg kortini ikki at síggja nakra sum helst grundgeving fyri at byggja ein flogvøll afturat.

– Flogvøllurin í Vágum hevur ein regularitet upp á 98%. Grundgevingin fyri at byggja ein vøll afturat, kann bara vera at fáa tey írestandi 2%.

– Men í Føroyum ber neyvan til at fáa ein hægri regularitet enn vit hava nú. So tey, sum vilja byggja ein flogvøll afturat, eru sostatt sinnað at brúka eina milliard, uttan at fáa ein regularitet, sum er betri enn hann er nú.



*Av lokalpolitiskum orsøkum hevði tað verið ein vanlukka fyri Vágar at flutt flogvøllin. Men sjálvt um vit sleppa lokalpolitikki, er ongin fyrimunur í at flyta flogvøllin, sigur Jørgen Niclasen*

## Nøktar framtíðartørvin

Jørgen Niclasen sigur, at tað verður ikki vil hansara atkvøðu, at vit brúka eina milliard til onga sum helst nyttu.

Men hvat sigur tú, skuldi tað hent, at ein samgonga, sum fólkaflokkurin við tær í, ger av at byggja ein nýggjan flogvøll.

– Skal ein nýggjur flogvøllur byggjast, skulu vit hava sakligar orsøkir fyri tí og tær havi eg ikki sæð enn.

– At seta hóttanir fram sømir seg ikki, men eg ivist ikki í, at vit hava ábyrgdarfullar politikarar í Føroyum, eisini um 10 ár, sum ikki eru sinnaðir at brúka eina milliard, uttan at fáa nakað afturfyri.

– Tað verður áhugavert at hoyra politikarar grundgeva fyri at longja vøllin í Vágum til 1600 metrar, tí tað nøktar okkara tørv – men samstundis sum teir grundgeva fyri at at vit mugu hava ein nýggjan vøll.

Jørgen Niclasen staðfestir, at tá ið vøllurin í Vágum, er longdur upp í 1600 metrar, klárar hann at nøkta okkara tørv. Og verður tað neyðugt, kann hann eisini leingjast upp í 1800 metrar.

Hann vísir eisini á, at ein grundgeving fyri at gera ein annan flogvøll, er, at so kunnu vit útflyta fisk av landinum. Men tað kunnu vit eisini við einum longdum vølli í Vágum.

Hann minnir eisini á, at í hansara tíð sum landsstýrismaður, vár ein hálv millión av til stuðul til tey, sum vildu flyta fisk út við flogfari. Men tíansheldur fór peningurin aftur í landskassan, tí ongin tók av og flutti fisk út við flogførum.



# Sleppa ikki at lumpa flogvøllin úr Vágum

**– Eg fari aldrin at góðtaka, at flogvøllurin verður fluttur úr Vágum, uttan fullgóð prógv fyri, at tað er betri og tey havi eg ikki hoyrt enn, sigur Marjus Dam**

FLOGVØLLUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg dugi ikki at síggja nakað skilagott í at byggja ein flogvøll afturat í Føroyum.

Tað sigur Marjus Dam, løgtingslimur fyri sambandsflokkin í Vágum.

Og hann staðfestir somuleiðis, at fær hann ikki fullgóð prógv fyri, at ein flogvøllur liggur betri onkra aðrastaðni í Føroyum, fer hann aldrin at góðtaka, at flogvøllurin verður fluttur úr Vágum.

– Men tey prógvini havi eg ikki sæð enn, leggur hann afturat.

Hóast landsstýrið nú hevur avgjørt at leingja vøllin í Vágum 350 metrar, so hann verður 1600 metrar, verður samstundis staðfest, at vit hava brúk fyri einum alternativum flogvølli, sum kann lúka framtíðar krøv.

Í hesum sambandi verða serliga trý støð kannað. Søltuvík í Sandoy, Glyvursnes á Streymoy og Skorðhædd í Eysturoy.

Men Marjus Dam heldur, at tað er øll orsøk til at vera á varðhaldi.

– Fyrr varð tosað um at gera ein framtíðarflogvøll í Føroyum. Nú er tað broytt til alternativan flogvøll.

Men sambandsmaðurin í Vágum heldur, at her er bara talan um gamalt vín í nýggjum fløskum.

– Endamálið er enn sum áður at flyta flogvøllin úr Vágum. Tí er alt tos um ein alternativan flogvøll ein hóttan ímóti vøllinum í Vágum.

Hann heldur tí, at hetta er ikki annað enn ein roynd at lumpa flogvøllin úr Vágum.



*– Fyrr varð tosað um ein framtíðarflogvøll í Føroyum. Nú verður tosað um ein alternativan flogvøll. Men hetta ikki annað enn ein roynd at sminka ætlanina at flyta vøllin úr Vágum, sigur Marjus Dam, løgtingsmaður fyri sambandsflokkin í Vágum*

## Milliardin brúkast betri aðrastaðni

Hann heldur, at tey, sum tala fyri einum alternativum flogvølli í Føroyum, hugsa ikki um samfelagsgagnið av honum, men um lokalpolitikk og atkvøður.

Hinvegin heldur hann ikki, at tað er lokalpolitikkur, tá ið hann vil tvíhalda um vøllin í Vágum.

– Flogvøllurin í Vágum hevur ein regularitet upp á eini 98%, tí tað kann teljast á einari hond, tær ferðirnar, sum flogvøllurin er afturlatin fyri veður.

– Hann hevur so høgan regularitet, at hóast vit brúka hálva aðru til tvær milliardir upp á ein nýggjan vøll, umframt rakstrarkostnaðin, fáa vit ongan bata burturúr tí. Tað einasta, vit fáa burturúr, er, at vøllurin er fluttur úr Vágum.

– Men aðrar orsøkir havi eg ikki sæð, sum kunnu tala fyri at hann verður fluttur.

Hann ásannar, at vøllurin í Vágum er heldur stuttur. Men hann staðfestir eisini, at tað ber til at byggja hann út til 1800 metrar.

– Gera vit tað, hava vit ein vøll, sum lýkur øll krøv til framtíðar flúgving í Føroyum í langa tíð frameftir og tað er endamálið, sama, hvar í Føroyum hann er.

Tí staðfestir Marjus Dam, at hann fer ongantíð at góðtaka, at vøllurin verður fluttur, bara av lokalpolitiskum orsøkum.

Hann vísir á, at tað er so sjáldan, at ólag er á flúgvingin í Vágum, at ein nýggjur flogvøllur er ein ræofficiellt dýrur prísur at betala fyri nakrar fáar lendingar og fráferðir, sum kunnu teljast á aðrari hondini.

– Eg haldi, at tann milliardupphæddin, sum ein nýggjur flogvøllur kostar, kunnu verða brúktar betri onkra aðra staðni í samfelagnum

– Kanska hevði tað verið skilabetri at bygt smærri flogvallir ymsastaðni í landinum, eitt nú í Suðuroy, sum kundi verið brúktur til innanlandsflúgving.

Hann heldur kortini, at er tað onkur, sum heldur tað vera áhugavert at kanna ymisk viðurskifti í hesum sambandi, so skal hann ikki leggja seg í vegin fyri tí.